# Þröstur og Kári í Blikk



*Hann hevur roynt eitt sindur av hvørjum – og ikki bert innan tónleikaheimin. Umframt at vera tónleikari, er hann eisini yrkjari og upplesari, og hann hevur eisini roynt ymiskt í sínum arbeiðslívi*

*Saman við Þrösturi Jóhannesson, fer Kári Sverrisson at syngja ymiskan fólkatónleik, og alt bendir á, at tey, sum fara í Café Blikk fáa eina hugnaliga løtu saman við báðum tónleikarunum*



**Mentanarvikan hevur nógv ymiskt at bjóða, bæði innan myndlist og tónlist av ymskum slagi. Hóskvøldið 1. november fara íslendski vísusangarin Þröstur Jóhannesson og okkara Kári Sverrisson at spæla ókeypis í Café Blikk í Saltangará**

FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir eru báðir fólkatónleikarar og vísusangarar, Þröstur Jóhannesson og okkara Kári Sverrisson.

Hóskvøldið 1. november fara teir báðir at seta hugnaligan dám á í Café Blikk í Saltangará, har teir fara at spæla og syngja ymiskan fólkatónleik, sum vit plaga at rópa tað.

Þröstur er føddur 2. januar í 1969 í Keflavík. Hann er yngstur av sjey systkjum. Pápi hansara var sjómaður og mamman heimagangandi. Saman við konu síni eigur Þröstur fýra synir, og tey búgva øll í Ísafirði, sum er vinarbýur hjá Skála, sum nú er partur av Runavíkar kommunu.

Sjálvur byrjaði Þröstur at spæla á gittara í tónleikaskúla, tá ið hann var 12 ára gamal. Hann fekk sín fyrsta el-gittara í fermingargávu, og tá stovnaði hann sín fyrsta rættiliga tónleikabólk. Síðani hevur hann spælt í fleiri ymiskum bólkum. Hann helt fram at útbúgva seg innan tónleikin, og hevur millum annað lært klassiskt gittarspæl á tónleikaskúlanum í Ísafirði.

Men tónleikurin hevur tó ikki altíð verið hansara høvuðsyrki. Þröstur hevur eisini arbeitt í fiskivinnuni, á goymslum, á prentmiðstøð og hjá sløkkiliði. Síðani 2003 hevur hann verið gittarlærari í tónleikaskúlanum.

Eitt av høvuðsáhugamálunum hjá Þrösturi er at lesa yrkingar, og hetta endurspeglast í tónleikinum hjá honum. Harafturat hevur hann eisini sjálvur skrivað yrkingar.

Um sín tónleik sigur Þröstur sjálvur, at hann er eitt gott bland av country og punk. Nýggjasta fløgan hjá honum eitur "Aðrir sálmar". Hon kom í 2006.

Konsertin við Þrösturi Jóhannesson og Kára Sverrisson er sum nevnt ókeypis, og hon byrjar í Café Blikk klokkan 21.



*Óli Simonsen verður ferðaleiðari á báðum gongutúrunum í Eysturoy í sambandi við Mentanarvikuna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Aftur á slóðina

**Næstu tveir sunnudagarnar verður skipað fyri søguligum gongutúrum í Eysturoy við Óla Simonsen sum ferðaleiðara**

FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Mentanarvikuni verður skipað fyri tveimum áhugaverdum gongutúrum í Eysturoy.

Hin fyrri verður sunnudagin 28. oktober, tá gingið verður úr Elduvík til Oyndarfjarðar, og hin seinni verður sunnudagin 4. november, tá gingið verður av Glyvradali oman til Glyvrar.

Ferðaleiðari á báðum túrunum verður Óli Simonsen. Kostnaður fyri hin fyrra túrin er 100 krónur og 80 krónur fyri hin seinna.

Túrurin úr Elduvík til Oyndarfjarðar byrjar klokkan 14, tá fólk hittast Yviri á Støð í Elduvík, haðani gingið verður.

Í Oyndarfirði verður hugt at Rinkusteinunum, og síðan verður gingið niðan í skúlan til ein góðan drekkamunn.

Bussur koyrir úr Oyndarfirði til Elduvíkar klokkan 16.30.

Á seinna túrinum av Glyvradali til Glyvrar, hittast fólk við fornminnissavnið Forna á Glyvrum, haðani bussur koyrir til Lamba.

Á Gomu støð í Lamba greiðir ferðaleiðarin frá søguni um Norsku Løvu. Síðan gongur leiðin yvir á Glyvradal, haðani gingið verður fram við Dalánni og Glyvragjógv til Glyvrar, har okkurt verður til matna í Forna.

Tilmelding til báðar gongutúrarnar fer fram á Kunningarstovuni í Saltangará á tlf. 417060.

# Beinta Hansen í Trend Floor



**Ein øðrvísi málningaframsýning verður í Trend Floor í Saltangará á Mentanarvikuni, tá Beinta Hansen fer at sýna fram sína forvitnisligu og litríku list**

*Listin hjá Beintu Hansen er forvitnislig við stórum litspæli*

FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Beinta Hansen er ung listarkvinna, sum byrjaði tíðliga at mála. Hon fór á listaháskúla í 1998, har hon serliga legði seg eftir myndlist, leiri og grafikki.

Unga listarkvinnan hevur serliga fingist við at mála og hevur verið við á framsýningum ymsastaðni í landinum.

Í løtuni lesur hon sjúkrarøktarfrøði.

- At arbeiða við menniskjum er í sjálvum sær ein íblástur til málningarnar, og tað er gott at hava kreativitetin við í arbeiðnum sum sjúkrarøktarfrøðingur, heldur Beinta Hansen.

Tað er torført at lýsa stílin hjá henni, tí hann fevnir víða – og tí má hann síggjast.

Listin er forvitnislig, og stórt litspæl er í listaverkunum.

Málningarnir hjá Beintu eru at síggja í Trend Floor frá mánadegnum 29. oktober, og klokkan 17 hendan dagin verður ferniseringing.

- Øll eru vælkomin inn á gólvið, sigur Beinta Hansen.